# Mín besta uppskrift

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



**UPPSKRIFT:** Kristin av Kák

# Lekkur skons

| | |
|---|---|
| 150 g | av hveitimjøli |
| 75 g | av rugmjøli |
| 3 tsk | av bakipulvuri |
| 1 | egg |
| 40 g | av smøri |
| 30 g | sukuri |
| 1½ dl | av mjólk |

Elt alt tilfarið saman. Rulla deiggið út til ein umleið 2-3 cm tjúkkan runding, sum skal skerast í seks bitar. Set ovnin á 200 hitastig. Skonsini skulu bakast í 10-12 minuttir ella til kanturin er ljósabrúnur. Perfekt til mannin sum vil forkela konuna ein sunnumorgun. Vælgagnist

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**

er nýggjur teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti
TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00
SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04

# Aftan fyri Sonhard

## – tann professionella mariuhønan

»TAÐ ER MEIRA ENN EITT ARBEIÐI... **TAÐ ER MÍTT JOB**!« HESIN SETNINGUR ER BARA EINA VIKU GAMAL, MEN HÓAST TAÐ ER HANN LONGU EIN KLASSIKARI. PROFESSIONELLA **MARIUHØNAN SONHARD** SIGUR HETTA Í STUTTLIGU LÝSINGINI FYRI MORGUNBREYÐ.



*Mariuhønan Sonhard hevur heimsins besta arbeiði og verður nokk meir at síggja framyvir*

**MYND:** EFFO

**LÝSING**

Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

Menninir handan lýsingina eru Petur Slyne á Effo og filmsmaðurin Thomas Koba. Leiklutin sum mariuhønan Sonhard hevur sjónleikarin Jákup Veyhe, vælkendur frá millum annað »Pipari og salti«.

Lýsingin var fystu ferð at síggja fríggjakvøldið fyri einari viku síðani. Leygardagin var Sonhard úti á Facebook, og eftir fáum døgum var fjepparatalið hjá tí professionellu mariuhønuni uppi á 2.000.

Petur Slyne er yvirraskaður av framgongdini.

– Sjálvandi vónaðu vit, at Sonhard mariuhønan fór at gerast ein sukse. Um man brúkar Jákup Veyhe, rakar man ofta eitt ella annað, sum nokk ikki fungerar líka væl, um ein annar sjónleikari var í leiklutinum, greiður Petur Slyne frá.

Petur Slyne og Thomas Koba høvdu fleiri dýr á borðinum, tá lýsingin bleiv gjørd, men valið fall á mariuhønuna, eftirsum hon er eitt fitt og »eitt sindur kiksað« dýr.

Tað er eitt rák innan lýsingaheimin at nýta humor fyri at selja sína vøru. Petur Slyne sigur seg hava fingið íblástur til Sonhard frá danska starvsfelag hansara »Vupti«.

Petur er eitt sindur loyndarfullur um framtíðina hjá Sonhard, men hann avnoktar ikki, at fleiri filmar koma um ævintýrini hjá tí professionellu mariuhønuni.

**Fær Sonhard eina Sonhardinu?**

– Tað er onkur av fjepparunum á Facebook, sum hava víst áhugað at blíva frú Sonhard, men eg veit ikki, hvussu tað verður við tí, sigur Petur Slyne.